Sameindu Tjóðir
CRPD/C/DNK/QPR/2-3

# Sáttmáli um rættindi teirra, ið bera brek

Distr.: General
17. apríl 2019

Upprunatekstur: Enskur
Bert enskur, russiskur og spanskur

## Nevnd teirra, ið bera brek

## Listi av málum, áðrenn onnur og triðja regluliga frágreiðingin frá Danmark verður latin inn*

1. Er ikki annað ásett, skulu svarini til spurningarnar í hvørjum parti í verandi lista av málum fevna um upplýsingar viðvíkjandi kongsríki Danmarkar og, um tað er viðkomandi, viðvíkjandi Grønlandi og Føroyum.

### A. Endamál og almennar skyldur (grein 1-4)

2. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Tiltøk til at tryggja, at sáttmálin verður innlimaður og galdandi sambært lóg í landinum, harímillum í Grønlandi og í Føroyum (CRPD/DNK/CO/1, sí stk. 13), og fyri at vekja ans hjá almennum myndugleikum og í samfelagnum fyri mannarættindafrymlinum viðvíkjandi breki og fyri landsins skyldum sambært sáttmálanum;

b) Tiltøk til tess at endurskoða og avtaka lóggávu, ið ger mismun ella ger umstøður teirra, ið bera brek, verri sambært sáttmálanum, serliga: donsku byggireglugerðina og broytingarnar frá 2017, ið forða fyri, at atkomukrøvini fyri bústaðareindir til einstakar familjur verða lokin; donsku vælferðarlógina (værgemålsloven), ið avmarkar rættarføri vegna brek; donsku lóg nr. 655 frá 2017 um ‘tvingsilsnýtslu í sambandi við likamliga viðgerð av varandi ófullførum’ (‘lov om anvendelse af tvang ved somatisk behandling af varigt inhabile’); donsku lóg nr. 574 frá 2014, ið broytti donsku eftirlønarlógina (pensionsloven) og herdi krøvini fyri fyritíðareftirløn; og donsku psykiatrilógina (lóg nr. 1160 frá 2015), ið heimilar tvingsilsinnlegging og viðgerð á psykiatriskum sjúkrahúsum;

c) Stig tikin til tess at fyrireika og samtykkja eina nýggja virkisætlan í Danmark, Grønlandi og Føroyum vegna tey, ið bera brek, ið fevnir um allar samfelagsgeirar og er grundað á mannarættindi, og sum veitir upplýsingar um mál, framstigsávísar og fíggjarætlan á øllum stigum; um luttøkuna hjá feløgum teirra, ið bera brek, í tilgongdini at samtykkja slíkar ætlanir og um ætlanir í sambandi við at tryggja samstarv millum samfelagsgeirarnar viðvíkjandi innliming av brekøkinum í lóggávu, almennum politikki og mannagongdum;

d) Løgfrøðiliga bindandi karmar og formligar skipanir, ið tryggja dygga ráðgeving og virkna luttøku frá feløgum teirra, ið bera brek, tá ið avgerðir skulu takast í sambandi við at fremja og hava eftirlit við sáttmálanum, harímillum í fyrireikingarkanningum viðvíkjandi nýggjari lóggávu, broytingaruppskotum og alemnnum politikki.

* Samtykt av nevndini á 21. fundi hennara (11. mars – 5. apríl 2019).

## B. Ávís rættindi (grein 5-30)

**Javnstøða og javnviðgerð (grein 5)**

3. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Virkisøkið fyri lóg nr. 688 frá 2018 um at banna mismuni vegna brek og stig tikin í Grønlandi og í Føroyum til tess at banna mismuni vegna brek á øllum økjum, ið ásett eru í sáttmálanum, og til tess at viðurkenna vantandi hóskandi bústaðarmøguleikar sum eitt slag av mismuni í øllum lívsins viðurskiftum, eins og vantandi atgongd, mismun vegna tilknýti, tulkað brek, fyrrverandi og framtíðar brek og vegna ymisk og samansett eyðkenni;

b) Stig tikin til at endurskoða verandi tryggingarlóggávu til tess at ógilda ásetingar, ið gera mismun í sambandi við tryggingargjøld og fulnað fyri heilsu, lív og ferðing, eins og innbústrygging fyri tey, ið bera brek, og fyri at tryggja javnbjóðis atgongd til rættindi vegna brek, harímillum endurgjald fyri meirkostnað vegna brek uttan mun til aldur ella rætt til eftirløn;

c) Tøk hjálparráð og ábøtur, harímillum rættin hjá teimum, ið bera brek, til at kæra og søkja endurgjald fyri mismun vegna brek í Danmark, Grønlandi og í Føroyum, og um tiltøk fyri at víðka um heimildir donsku javnviðgerðarnevndarinnar (Ligebehandlingsnævnet) til at fevna um allan mismun vegna ymisk og samansett eyðkenni, ið fólk, ið bera brek, harímillum samkynd, tvíkynd og tvørkynd, eru fyri uttan fyri arbeiðsmarknaðin. Vinaliga útvega eisini hagtøl (tøl og prosentpart) fyri fráboðanir um mismun vegna brek, býtt á kyn, aldur, eyðmerktar forðingar og økið, mismunurin varð framdur innanfyri, og hagtøl fyri hjálparráð og ábøtur, harímillum endurgjald.

**Kvinnur, ið bera brek (grein 6)**

4. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Framstig innan arbeiðið við at tryggja at hædd verður tikin fyri kyni og breki í allari landsins lóggávu og politikki á øllum økjum, ið umtalað eru í sáttmálanum, og at hesi á munagóðan hátt viðgera viðurskifti ísv. serligar vandar fyri og forfjónan av kvinnum og gentum, ið bera brek. Vinaliga greið eisini frá tiltøkum fyri at tryggja, at kvinnur og gentur, ið bera brek, (harímillum feløg fyri kvinnur, ið bera brek) verða hoyrdar og givnar ans, tá ið avgerðir skulu takast;

b) Tiltøk, harímillum forrættindareglur, fyri at basa mismuni móti kvinnum og gentum, ið bera brek, vegna ymisk og samansett eyðkenni, serliga kvinnum og gentum, ið andliga ella sálarliga og sosialt eru ófullførar, í øllum lívsins viðurskiftum, og fyri at tryggja fulla menning, stimbran og heimilan av kvinnum og gentum, ið bera brek, í Danmark, Grønlandi og í Føroyum.

**Børn, ið bera brek (grein 7)**

5. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Almenna lóggávu, politikk og tilboð í Danmark, Grønlandi og í Føroyum, ið tryggja øll rættindi hjá børnum, ið bera brek, harímillum tilboð um menning til smábørn og stuðul til at luttaka í og vera partur av egnum nærumhvørvi uttan mun til tarn, og sum tryggja samskipan á øllum viðkomandi økjum;

b) Upplýsingar um børn, ið bera brek, býttar á aldur, kyn, etniskan uppruna, tjóðskap, hvørt tey søkja um friðskjól ella eru flóttafólk, sum eru við í landsumfevnandi virkisætlanum at verja barnarættindi í landinum, við neyvum ávísingum til støðuna í Grønlandi og í Føroyum;

c) Framstig ísv. stuðul til at veita familjugrundaða røkt og um arbeiðið við at styrkja heimarøktina fyri børn, ið bera brek, sum ikki kunnu búgva heima hjá familjum sínum, til tess at forða fyri, at tey enda á stovni;

d) Stig tikin til at tryggja, at øll børn, ið bera brek, fáa stuðul til at gera hugsan sína galdandi, og at hugsanir teirra fáa hóskandi ans í samsvari við aldur og búning, tá ið avgerðir, ið teimum

viðkoma, verða tiknar, og um tiltøk fyri at stovna feløg fyri børn, ið bera brek, og skipanir, ið tryggja luttøku teirra, tá ið almennar avgerðir skulu takast.

**Tilvitskugerð (grein 8)**

6. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Virkisætlanir um tilvitskugerð hjá danska ráðnum fyri tey, ið bera brek (Det Centrale Handicapråd) fyri at basa fordómum, niðran og mismuni móti fólki, ið bera brek, serliga teimum, ið tørva nógvan stuðul, og um hvussu nógv feløg í landinum fyri tey, ið bera brek, luttaka í tilrættislegging, fremjan, eftirliti og eftirmeting av virkisætlanum fyri tilvitskugerð;

b) Stig tikin til at hava reglulig og áhaldandi átøk, ið venda sær til embætisfólk eins og fólk innan privata økið, harímillum í miðlaheiminum og á alnetinum, viðvíkjandi rættindum teirra, ið bera brek sambært sáttmálanum.

**Atkoma (grein 9)**

7. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Staðbundna lóggávu og politikk hjá kommunum og staðbundnum myndugleikum, samsvarandi grein 9 í sáttmálanum;

b) Umfatandi ætlanir fyri at tryggja atkomu til fysiskt undirstøðukervi, vegir, ferðing, uttandura øki og upplýsingar- og samskiftistøkni, teirra endamál, tíðarkarmar, fíggjarætlan og revsitiltøk ísv. brot á ásettar reglur. Vinaliga kunna um tiltøk, ið tryggja javngerð av øllum jarnbreytarpallum við ávísing til ES-kommissjónsreglugerð nr. 1300/2014 frá 18. november 2014 um tøkniligar nærlýsingar av tvørvirkisføri viðvíkjandi atkomu til jarnbreytarkerv Samveldisins hjá teimum, ið bera brek, og fólki við rørslutarni;

c) Atkomu til alla ferðing, harímillum sjóvegis og loftvegis, um talgilda atkomu til almennar tænastur í Grønlandi, og um tiltøk fyri at hava eftirlit við atkomu til fysiskt umhvørvi, ferðing, upplýsing og samskifti í Grønlandi og í Føroyum;

d) Atkomukrøv í øllum almennum keypsavtalum;

e) Fígging og vegleiðing til at tryggja fullgóða atkomu til skúlar, harímillum almennar og privatar bygningar sum t.d. bústaðir, matstovur, barrir og baðistrendur, til gransking og útbúgving innan atkomu og algilda sniðgeving fyri øll tey, ið bera brek, og til at tryggja atkomu til øðrvísi samskiftishættir fyri børn, ið bera brek;

f) Atkomu til heimasíður og talgilt samskifti, harímillum telefonappir hjá kommunum, samsvar við alnetsatkomuleiðreglurnar (the Web Content Accessibility Guidelines) og kæruskipanir, ið tryggja, at atkomukrøv verða lokin.

**Rætturin til lív (grein 10)**

8. Vinaliga greið frá tiltøkum fyri at verja rættin til lív hjá teimum, ið bera brek, serliga fyri at fyribyrgja fátækadømi millum børn, ið bera brek, og persónar á stovnum, og fyri at tryggja, at allar avgerðir viðvíkjandi heilivágsviðgerð í lívshættisligum støðum eru grundaðar á kunnað samtykki.

**Vanda- og neyðstøður (grein 11)**

9. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Stig tikin til at tryggja, at vanda- og vanlukkufyribyrgjandi skipanir, serliga ávaringarskipanir og mannagongdir, eru atkomiligar fyri øll og taka hædd fyri tørvi teirra hoyrnaveiku, samsvarandi Sendai-skránni fyri vanda- og vanlukkufyribyrging 2015-2030;

b) Stig tikin til at tryggja, at tey, ið bera brek, og feløgini, ið umboða tey, fáa hóskandi kunning, verða eftirspurd og luttaka á øllum stigum í tilrættisleggingini, fremjanini og eftirlitinum av virkisætlanum, skráum og mannagongdum viðvíkjandi vanda- og vanlukkufyribyrging og neyðstøðum.

**Líka fyri lógini (grein 12)**

10. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Stig tikin til at ógilda avmarkingar av rættarføri vegna veruligt ella tulkað tarn í donsku vælferðarlógini (værgemålsloven) og fyri at evna stuðulsskipanir til støðutakan í øllum lívsins viðurskiftum;

b) Tiltøk fyri at tryggja, at stuðul til støðutakan, ið er lagaður til tørv hins einstaka við virðing fyri sjálvræðisrætti, vilja og vali hins einstaka, er tøkur hjá teimum, ið bera brek;

c) Hvussu nógv verjumál eru sett í verk, og hvussu nógv fólk, ið bera brek, hava fingið rættarføri aftur, síðan sáttmálin varð staðfestur.

**Atgongd til dómstólarnar (grein 13)**

11. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Stig tikin innan rættarverkið fyri at kunna veita teimum, ið bera brek, eina tillagaða rættargongd, sum eisini leggur upp fyri aldri, eisini tá ið tey skulu vera vitni í rættargongd;

b) Tiltøk fyri at tryggja teimum, ið bera brek, atgongd til løgfrøðiliga hjálp og umboðan á øllum løgfrøðiligum økjum, harímillum ísv. rættarmál viðvíkjandi mismuni, borgarligan rætt, revsilógina, fyrisitingarlig sakarmál og kærur viðvíkjandi almannaveitingum;

c) Tilvitskugerð og førleikamenning innan rættarverkið í sambandi við rættindi teirra, ið bera brek, sambært sáttmálanum. Vinaliga greið eisini frá, hvussu einstaklingar, ið bera brek, og feløgini, ið umboða tey, ið bera brek, eru við til at leggja til rættis og skipa fyri undirvísing fyri løgreglu og fangavørðum um rættindi teirra, ið bera brek.

**Frælsi og trygd hins einstaka (grein 14)**

12. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Stig tikin til at fyribyrgja frælsistøku og óynsktari viðgerð vegna tarn, serliga hjá persónum, ið sálarliga og sosialt eru ófullførir og fáa ‘likamliga (somatiska) heilsurøkt’;

b) Tiltøk til at endurskoða donsku psykiatrilógina fyri at steðga tvingsilsinnlegging á sjúkrahúsum og tvingsilsviðgerð av øllum persónum, ið bera brek, serliga børnum undir 15 ár, sum ikki hava rætt til ta verju, ið sama lóg veitir persónum yvir 15 ár;

c) Tiltøk til at ógilda ásetingar í donsku revsilógini og grønlendska revsirættarganginum, ið lýsa tey, ið bera brek, at vera óskikkað at kæra, og sum taka frælsið frá teimum í rættargangshøpi, og fyri at tryggja teimum, ið bera brek, javnbjóðis rættargang við onnur og stundisliga útskriving av rættarlæknafrøðiligum psykiatriskum deildum;

d) Hagtøl býtt á kyn og aldur um persónar, ið bera brek, í tvingsilsviðgerð, sum eru dømdir at fáa rættarlæknafrøðiliga sálarsjúkuviðgerð, og tiltøk fyri at steðga tilburðum av rættarlæknafrøðiligum sálarsjúkuviðgerðum.

13. Vinaliga útvega upplýsingar um stig tikin til at steðga samtyktini av ískoytisfrumskjalinum til sáttmála Evroparáðsins til verju av mannarættindum og menniskjans tign viðvíkjandi nýtsluni av lívfrøði og læknavísindum: Millumtjóðasáttmálin um mannarættindi og lívlæknafrøði (ETS Nr. 164) (Oviedo-sáttmálin).

**Frælsi frá píning ella miskunnarleysari, ómenniskjaligari ella mannminkandi viðgerð ella revsing (grein 15)**

14. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Stig tikin til at avtaka og banna øllum tvingsli, kropsligum hafti við reimum og tvingsilsheilivágsviðgerð av persónum, ið bera brek, harímillum børnum, ið bera brek og fáa sálarliga heilsurøkt og búgva á stovnum fyri sálarsjúk. Vinaliga greið frá arbeiðinum við at tryggja, at dátur og upplýsingar viðvíkjandi viðgerð av børnum á slíkum stovnum eru tøkar, so at eftirlit kann havast og eftirmetingar gerast til tess at handfara brot á rættindi teirra sum avleiðing av tvingsli;

b) Dátur býttar á aldur og kyn um persónar, ið bera brek og hava verið fyri tvingsli ísv. sálarliga viðgerð, og um óynskta ambulanta viðgerð av persónum, ið sálarliga og sosialt eru ófullførir, síðan 2014, og um tiltøk fyri at betra um innsavning av dátum viðvíkjandi nýtslu av tvingsilsátøkum í psykiatriini í Grønlandi;

c) Tiltøk fyri at forða fyri óynsktari viðgerð av persónum, ið sálarliga og sosialt eru ófullførir, harímillum ambulantari viðgerð, og um stig tikin til at veita starvsfólki í heilsuverkinum undirvísing í viðgerðarhættum uttan harðskap og tvingsil.

**Frælsi frá misnýtslu, harðskapi og ágangi (grein 16)**

15. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Stig tikin til at verja tey, ið bera brek, serliga kvinnur og gentur, ímóti øllum slag av misnýtslu, harðskapi og ágangi, og um stig tikin til at tryggja teimum, ið bera brek og hava verið fyri harðskapi, munagóða heilsubót, uppafturvenjing og tænastur og tilboð, ið slóða fyri endurnýggjaðari samfelagsluttøku;

b) Tiltøk fyri at tryggja javnbjóðis rættarvernd fyri tey, ið bera brek, í sambandi við neyðtøku við samlegu og fyri at beina burtur munir á revsingum fyri slík brotsverk;

c) Hvussu nógvar kærur eru móttiknar, og hvussu nógvir viðkomandi úrskurðir eru gjørdir viðvíkjandi misnýtslu av og ágangi ella harðskapi ímóti persónum, ið bera brek, býttar á aldur og kyn.

**Vernd av friðhalgan hins einstaka (grein 17)**

16. Vinaliga útvega upplýsingar um tiltøk fyri at endurskoða og bøta um borgarastýrdu persónsstuðulsskipanina, serliga á heimaumsjónarøkinum, ið verður mett at vera ‘serstakliga átrokandi og lemjandi’ vegna áhaldandi umsjónina alt samdøgrið. Vinaliga útvega eisini upplýsingar um lógarkarmarnar kring fyribyrging av tvingsilsgelding og tvingsilsfosturtøku og um eitthvørt slíkt mál, ið er vorðið fráboðað.

**Rásarúm og tjóðskapur (grein 18)**

17. Vinaliga útvega upplýsingar um lógarkarmarnar kring familjusameining av flóttafólki og kunna um hvørt brek er viðurkent sum grundarlag fyri familjusameining uttan fyri familjueindina.

**At liva sjálvstøðugt og vera við í samfelagnum (grein 19)**

18. Vinaliga útvega upplýsingar um stig tikin til at:

a) Viðurkenna rætt hins einstaka, ið ber brek, til at liva sjálvstøðugt og luttaka í samfelagnum, steðga bygging av øllum stovnum, harímillum stórum byggiverkætlanum við tøttum stovnskendum bústøðum til persónar, ið bera brek;

b) Ógilda partar í donsku kunngerðini frá 2017 um almennar tænastur (Serviceloven), ið loyva tvingsilsflutningi av persónum, ið bera brek, til vardan bústað og so statt taka frá teimum møguleikan at velja bústað;

c) Tryggja, at samtyktir um einstaklingastuðul stundisliga verða framdar í verki av donsku kommununum, og fyri at veita teimum, ið bera brek, í Grønlandi og í Føroyum stuðul til at liva sjálvstøðugt, ið er lagaður til tann einstaka, umframt greinaðar dátur um stuðul, ið longu er tøkur, persónligan stuðul, stuðul aftur fyri vørur ella reiðan pening, harímillum eginfíggjaðan;

d) Samtykkja virkisætlanir og veita fígging til at tryggja teimum, ið bera brek, atkomuligar bústaðir á øllum bústaðarøkjum í Føroyum;

e) Upplýsa um nevndarinnar almennu viðmerking nr. 5 (2017) um at liva sjálvstøðugt og vera við í samfelagnum í samstarvi við tey, ið bera brek, og feløgini, ið umboða tey.

**Talu- og skrivifrælsi og atgongd til upplýsing (grein 21)**

19. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Átøk at tryggja, at deyvum stendur í boði at læra og samskifta á donskum deyvamáli, og um arbeiðið fyri at fremja gransking í framhaldandi menning og stimbran av deyvamáli sum samskiftishátti hjá hoyri- og taliveikum;

b) Stig tikin til at viðurkenna blindaskrift sum alment skriftmál, stovna eitt blindaskriftráð, ið skal stuðla, varðveita, upplýsa og økja um nýtsluna av blindaskrift, og um stig tikin til at veita persónum við lærutrupulleikum léttlisnar og aðrar tøkar upplýsingar;

c) Tiltøk fyri at viðurkenna og stuðla víðkaðum og øðrvísi samskiftishættum og hóskandi standardum, ið verða nýttir í sambandi við hesar samskiftsættir.

**Virðing fyri privatlívi (grein 22)**

20. Vinaliga greið frá íverksettum tiltøkum ella ætlanum viðvíkjandi rættingum í psykiatrilógini fyri at forða fyri privatir trúnaðarupplýsingarum persónar, ið bera brek, á psykiatriskum sjúkrahúsum verða latnar triðjaparti uttan samtykki frá viðkomandi, ið upplýsingarnar viðvíkja.

**Virðing fyri heimi og familju (grein 23)**

21. Vinaliga útvega upplýsingar um stig, tikin fyri at veita foreldrum, ið bera brek, hóskandi stuðul til at útinna ábyrgd teirra sum foreldur, tryggja, at einki barn verður tikið frá foreldrum sínum vegna ófullføri hjá annaðhvørt barninum ella báðum foreldrum, og fyri at banna mismuni innan ættleiðingarmannagongdir vegna brek. Vinaliga greið eisini frá stigum, ið tikin eru fyri at stuðla foreldrum at børnum, ið bera brek, tá ið barnið fyllir 18 ár.

**Útbúgving (grein 24)**

22. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Stig tikin til at tryggja øllum børnum, ið bera brek, fulla luttøku í skúlaskipanini, harímillum í fólkaskúlanum, og til at tryggja, at neyðugi stuðulin er tøkur og fyrilit tikið, serliga fyri autistisk børn og børn, ið hava tørv á nógvum stuðli;

b) Stig tikin til at venja og tilbúgva lærarar og onnur starvsfólk á skúlunum innan fevnandi frálæru, undirvísingarhættir og serfrøði, ið tryggja, at næmingar, ið bera brek, luttaka í útbúgvingini, og um fólkfeingi, tøkniligan og fíggjarligan stuðul til skúlar, harímillum í Grønlandi og í Føroyum;

c) Tiltøk til at betra um vánaligu úrslitini í skúlanum hjá persónum, ið bera brek, harímillum innan yrkisútbúgvingar;

d) Hvussu nógv børn, ið bera brek, í tali og prosentparti, hava atgong til fevnandi dygdarútbúgving, býtt á aldur og kyn, slag av breki, slag av skúla og á kommunu;

e) Hvørt landið hevur gjørt kanningar viðvíkjandi fíggjarligu, sosialu og mentanarligu fyrimununum við fevnandi útbúgving, og hvørt nevndarinnar almenna viðmerking nr. 4 (2016) um rættin til fevnandi útbúgving er vorðin breidd út við lít millum yrkisfólk og serfrøðingar í tøttum samstarvi við feløgini, ið umboða tey, ið bera brek.

**Heilsa (grein 25)**

23. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Tiltøk, harímillum landsumfevnandi og staðbundnar virkisætlanir, til at betra um atgongdina hjá teimum, ið bera brek, til heilsuhentleikar og tænastur, harímillum atgongd til screening fyri lívmóðurhálskrabba hjá kvinnum, ið bera brek, kvinnum við heilalammilsi (Cerebral Paresa) og kvinnum við vitbornum breki, umframt upplýsingar um kynsliga og nøringarheilsurøkt;

b) Tiltøk fyri at minka um høga deyðatíttleikan millum persónar, ið sálarliga og sosialt eru ófullfør, harímillum gjøgnum munagott eftirlit og regluligar heilsukanningar;

c) Tiltøk fyri at tryggja fulnað fyri hoyritól og -viðgerð frá heilsuverkinum;

d) Íverksett tiltøk fyri at nøkta tørv teirra, ið bera brek, í sambandi við ferðing til heilsuhentleikar og ísv. tilbúgving til tey, ið sálarliga og sosialt eru ófullfør í Føroyum.

**Venjing og uppafturvenjing (grein 26)**

24. Vinaliga útvega upplýsingar um arbeiðið við at tryggja tøkar venjingar- og uppafturvenjingartænastur til persónar, ið bera brek í Føroyum, og um framstigini ísv. góðskuna av uppafturvenjingartænastunum og serkøn starvsfólk í Danmark og í Grønlandi.

**Arbeiði (grein 27)**

25. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Íverksett tiltøk fyri at hækka munandi um prosentpartin av virknum persónum, ið bera brek, á opna arbeiðsmarknaðinum og fyri at minka um arbeiðsloysið millum tey, ið bera brek;

b) Tiltøk fyri at basa fordómum, ið forða teimum, ið bera brek, atgongd til arbeiðsmarknaðin;

c) Stig tikin til at hjálpa teimum, ið bera brek, við at útinna rætt sín at velja frítt ella taka ímóti arbeiðstilboðum í umhvørvi, ið er opið, fevnandi og atkomiligt fyri tey, serstakliga rætt teirra til frítt at velja arbeiði á arbeiðsmarknaðinum í Grønlandi;

d) Árlig samanberandi hagtøl og dátur frá farna frágreiðingarskeiði fyri, hvussu nógvir persónar, uttan mun til um teir bera brek ella ikki, eru arbeiðsleysir, hava hægri útbúgving, enn starv teirra krevur, og hvussu nógv hava meira enn eitt starv, umframt hagtøl og dátur fyri, hvussu nógv ikki eru í nakrari útbúgving, arbeiði ella læru í løtuni, býtt á kyn, aldur, etniskan uppruna, familjustøðu, og hvørt tey búgva í býi ella á bygd.

**Nøktandi lívskor og almannavernd (grein 28)**

26. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Fyritíðareftirlønarnýskipanina, ið møguliga fer at útihýsa teimum undir 40 ár, ið bera brek;

b) Íverksett tiltøk fyri at veita teimum, ið bera brek, fólkapensjón (uttan inngjaldstreytir), eisini teimum, ið tørva nógvan stuðul;

c) Metingar kring árinini á lívskorini hjá teimum, ið bera brek, av avmarkingunum í almannveitingum, umframt upplýsingar um ósamsvarandi árin í mun til kyn, aldur og slag av tarni;

d) Greinaðar dátur um tey, ið bera brek og hava fingið fyritíðareftirløn síðan fyritíðareftirlønarskipanin kom í gildi; inntøkustøðið hjá húsarhaldum hjá teimum, ið bera brek, samanborið við onnur húsarhald síðan 2014; og um tey, ið bera brek og fáa arbeiðsloysisstuðul úr donsku arbeiðsloysisskipanini.

**Luttøka í politiskum og almennum viðurskiftum (grein 29)**

27. Vinaliga greið eisini frá tiltøkum fyri at tryggja virkna luttøku ísv. val og fulla atgongd til valstøð, harímillum lættlisna upplýsing í øllum landinum, serliga í Grønlandi og í Føroyum.

**Luttøka í mantanarlívi, frítíðarítrivi, dagdvølju og ítrótti (grein 30)**

28. Vinaliga útvega upplýsingar viðvíkjandi ætlanunum um at samtykkja eina landsumfevnandi virkisætlan fyri at stuðla og verja rættin til ítriv, ítrótt og mentanarvirksemi á ein fevnandi hátt. Hvørji tiltøk eru sett í verk fyri at gera mentanardeplar sum til dømis leikhús, søvn, biografar osfr. atkomuligar fyri persónar, ið bera brek?

## C. Ávísar skyldur (grein 31-33)

**Hagtøl og dátuinnsavning (grein 31)**

29. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Tiltøk fyri at tryggja nøktandi og varandi fígging til SHILD (The Survey of Health, Impairment, and Living Conditions in Denmark), ið er kanning av heilsu, tarni og lívskorum í Danmark, og fyri at skipa dátuinnsavning viðvíkjandi støðuni hjá børnum undir 16 ár, ið bera brek, og persónum yvir 64 ár, ið bera brek;

b) Menningina av neyðugu útgerðini til umfatandi innsavning av dátum viðvíkjandi støðuni hjá teimum, ið bera brek, í øllum lívsins viðurskiftum í Grønlandi og í Føroyum, og um hvussu dátuinnsavning fer fram sambært háttalagnum, ið viðger brek við støði í mannarættindum, og sambært metingarstøðinum og frymlinum, ið verða nýtt;

c) Stig tikin til at savna, greina og útvega dátur viðvíkjandi teimum, ið bera brek, á skipaðan hátt, og um hvussu útveganin verður framd á øllum stjórnarstigum, eisini í Grønlandi og í Føroyum.

**Altjóða samstarv (grein 32)**

30. Vinaliga útvega upplýsingar um tiltøk til at tryggja luttøku frá feløgum teirra, ið bera brek, tá ið avgerðir skulu takast ísv. altjóða samstarv bæði á altjóða og økisbundnum stigi og ísv. menningarpolitikk viðvíkjandi menningarlondum, og um tøkar møguleikar hjá feløgum teirra, ið bera brek, sjálvum at luttaka í verkætlanum í menningarlondum og minst framkomnu londum.

31. Vinaliga greið frá íverksettum tiltøkum fyri at innlima háttalagið, ið tekur støði í rættindum teirra, ið bera brek, ísv. 2030 heimsmálini fyri burðardyggari menning og framstigsávísum teirra í landsins menningarpolitikki.

**Landsumfevnandi fremjan og eftirlit (grein 33)**

32. Vinaliga útvega upplýsingar um:

a) Hvar brennidepilin ella brennideplarnir liggja ísv. at fremja sáttmálan, heimildina og almennu frágreiðingar um landsins millumstjórnanevnd og um formligu samskipanina at fremja sáttmálan í verki á landsumfatandi og staðbundnum stigi;

b) Stig tikin til at staðfesta ein brennidepil og samskipa fremjanina av sáttmálanum, og um tiltøk fyri at áseta karmar fyri einum óheftum eftirliti av sáttmálanum í Føroyum;

c) Løgfrøðiliga bindandi karmar og formligar skipanir fyri at tryggja luttøku frá teimum, ið bera brek, og feløgum teirra í óhefta eftirlitinum við sáttmálanum, og um tøkan stuðul til feløg teirra, ið bera brek, til at fremja munagóðar broytingar viðvíkjandi eftirlitinum við sáttmálanum;

d) Eitthvørt stig, ið landið hevur tikið til at samtykkja og/ella broyta lóggávu, politikk og mannagongdir viðvíkjandi rættindum teirra, ið bera brek, sambært tilmæli og/ella niðurstøðum frá óhefta eftirlitinum;

e) Stig tikin til at styrkja danska mannarættindastovnin (Institut for Menneskerettigheder) so hann fær útint heimild sína á munagóðan og óheftan hátt sambært París-reglunum.